Eitt sindur um skatt 2010

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Eitt sindur um skatt 2010

Januar 2010

Heimasíða: www.spekt.fo

Umbróting, prent og liðugtgerð: Føroyaprent

SPEKT veitir tænastur innan grannskoðan, roknskap, skatt, KT-grannskoðan og vinnuráðgeving (corporate finance).

Vit hava ein góðan og breiðan kundaskara m.a. innan handil og ídnað, fíggingarstovnar eins og kommunur og landið.

Niðanfyri hava vit greitt eitt sindur frá ymiskum skattaviðurskiftum fyri árini 2009 og 2010 hjá persónum og feløgum. Vegleiðingarnar eru stuttorðaðar og fevna bert um ein part av galdandi skattareglum. Hetta merkir, at tygum eiga at útvega fleiri upplýsingar, eisini upplýsingar um viðurskifti, sum ikki eru umrødd her, áðrenn støða verður tikin til týðandi skattamál.

Dagføringar eru at síggja á www.spekt.fo

Innihald

1 Sjálvuppgáva v.m. fyri 2009 7
1.1 Persónar 7
1.2 Feløg, felagsskapir og deyðsbúgv 9
2 Skattatalvur v.m. 10
2.1 Skattur hjá persónum við fullari skattskyldu 10
2.2 Skattur hjá persónum við avmarkaðari skattskyldu 12
2.3 Partafelagsskattur v.m. 13
2.4 Kapitalvinningsskattur 13
2.5 Tonsaskattaskipanin 14
2.6 Deyðsbúgv 14
2.7 Arvaavgjald 15
3 Frádráttir í skattskyldugu inntøkuni 16
3.1 Eftirlønarskipanir 16
3.2 Arbeiði uttanlands ella umborð á útlendskum skipi 16
3.3 Fiskiveiðuinntøka 16
3.4 Hýra frá útlendskum skipum, undantikið fiskiskipum 16
3.5 Skattligt hall 17
3.6 Rentufrádráttur 17
3.7 Hjúnafrádráttur 18
4 Frádráttir í skattinum 19
4.1 Barnafrádráttur 19
4.2 Pensjónsfrádráttur 19
4.3 Frádráttur fyri goldnan skatt uttanlands 20
5 Ágóðar, endurgjøld og serligar inntøkur 21
5.1 Gávur 21
5.2 Starvsfólkaágóðar 21
5.3 Eginnýtsla hjá privatum vinnurekandi 22
5.4 Endurgjald fyri egnan bil 22
5.5 Endurgjald fyri egna telefon 23
5.6 Dagpeningur og náttarviðbót 23
6 Eftirlønarskipanir 25
6.1 Eftirlønarskipanir 25
6.2 Eftirlønarskipan við stigvísari útgjalding 25
6.3 Eftirlønarskipan við lutaútgjalding 25
6.4 Eftirlønarskipan við kapitalútgjalding 26
6.5 Skiftisreglur fyri árini 2006 - 2009 26
6.6 Útlendskar eftirlønarskipanir 27
7 Av- og niðurskrivingar 28
7.1 Salduavskrivingar 28
7.2 Eins stórar avskrivingar hvørt árið 28
7.3 Vinningur og afturvunnar avskrivingar 29

7.4 Avskriving av tapi upp á skuldarar 30
7.5 Niðurskriving av vørugoymslum 30
8 Kapitalvinningsinntøka 31
8.1 Vinningur og tap við avhending av partabrøvum 31
8.2 Vinningur við avhending av lánsbrøvum 33
8.3 Eftirgeving av skuld 33
8.4 Vinningsbýti 33
8.5 Rentur 34
8.6 Vinnuligt virksemi 34
9 Stuðul 35
9.1 Rentustuðul 35
9.2 Ferðastuðul 35
9.3 Stuðul til dupult húsarhald 36
9.4 Stuðul til uppihaldspening 37
9.5 Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði 37
10 Sosial gjøld 39
10.1 Arbeiðsloysistrygging (ALS) 39
10.2 Barsilsskipanin 40
10.3 Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur 40
10.4 Heilsutrygd 41
11 Meirvirðisgjald 42
11.1 Skrásetingarskyldan 42
11.2 Undantøk frá avgjaldsskylduni 42
11.3 Útleiga av fastari ogn 42
11.4 Ongin frádráttur fyri meirvirðisgjald av ávísum kostnaði 43
11.5 Meirvirðisgjald í sambandi við keyp/sølu og rakstur av bilum 43
11.6 Meivirðisgjald av tapi upp á skuldarar 44
11.7 Lønarhæddaravgjald 44

1. Sjálvuppgáva v.m. fyri 2009

1.1 Persónar

Fyrst í árinum verða upplýsingar sendar út til allar skattgjaldarar um inntøkur, skatt og ognarviðurskifti í 2009. Alt eftir umstøðunum kunnu skattgjaldarar fáa sendandi skattauppgerð umframt oyðubløð til vanliga sjálvuppgávu og kapitalvinningssjálvuppgávu, og í ávísum førum eisini oyðublað til ognaruppgerð.

Vanlig sjálvuppgáva

Skattgjaldarar, ið eru skrásettir at hava bæði A- og B-inntøku, fáa eina vanliga sjálvuppgávu sendandi. Sjálvuppgávan skal latast inn til TAKS í seinasta lagi 15. mars 2010. Vinnurekandi hava tó freist til 1. mai 2010 at lata sjálvuppgávuna inn til TAKS.

Møguleiki er fyri at avgreiða sjálvuppgávuna á internetinum á www.taks.fo, um serliga loynitalið frá TAKS verður nýtt. Loynitalið er upplýst á sjálvuppgávuni.

Persónar, ið hava uttanlandsinntøku, skulu saman við sjálvuppgávuni lata TAKS eitt fylgiskjal har uttanlandsinntøkan verður nærri greinað. Fylgiskjalið til uttanlandsinntøkur kann heintast á www.taks.fo. Persónar við uttanlandsinntøku kunnu ikki avgreiða sjálvuppávuna á internetinum.

Um so er, at freistin fyri innlating er ein leygardag, sunnudag ella annan halgidag, er innlatingardagurin ístaðin næsti gerandisdagur. Um sjálvuppgáva ikki verður innlatin rættstundis, verður sekt áløgd við upp til 5.000 kr.

Kapitalvinningssjálvuppgáva

Kapitalvinningssjálvuppgáva við forprentaðum upplýsingum verður send øllum skattgjaldarum. Kapitalvinningssjálvuppgávan er prentað á sama oyðublað sum vanliga sjálvuppgávan og skal latast inn til TAKS eftir somu treytum sum vanliga sjálvuppgávan.

Møguleiki er eisini fyri at avgreiða kapitalvinningsjálvuppgávuna á internetinum á www.taks.fo.

Automatisk skattauppgerð

Skattgjaldarar, ið eru skrásettir bert at hava A-inntøkur, fáa automatiska skattauppgerð fyri 2009 sendandi frá TAKS. Í skattauppgerðini er endaligi skatturin útroknaður við støði í skrásettum upplýsingum. Um skattgjaldarin er sannførdur um, at skattauppgerðin er røtt og fullfíggjað, kann hann lata vera við at lata sjálvuppgávu inn fyri árið. Frádráttur

fyri inngjøld til føroyskar eftirlønarskipanir er íroknaður í skattauppgerðini.

Um skattauppgerðin ikki er rætt ella fullfíggjað skal vanlig sjálvuppgáva latast inn til TAKS.

Ognaruppgerð

Allir skattskyldugir persónar, ið hava roknskaparskyldu ella eiga ogn uttanlands, skulu lata ognaruppgerð inn saman við sjálvuppgávuni. Persónar, sum hvørki hava roknskaparskyldu ella eiga ogn uttanlands, kunnu lata vera við at lata inn ognaruppgerð, um ongar broytingar eru í mun til seinast innlatnu ognaruppgerðina. Hetta er tó ikki galdandi fyri skattskyldugar persónar, sum á fyrsta sinni skulu lata inn ognaruppgerð.

TAKS kannar av og á, um skrásettu upplýsingarnar á ognaruppgerðini eru rættar. Tá verður ognaruppgerð við skrásettum upphæddum send viðkomandi skattgjaldarum. Skattgjaldarin hevur tá skyldu til at undirskriva ognaruppgerðina og senda hana aftur til TAKS við møguligum rættingum.

Vinnurekandi

Sjálvuppgávan hjá persónum, sum reka sjálvstøðugt vinnuvirki, skal latast inn til TAKS í seinasta lagi 1. mai 2010. Rakstrarroknskapur og fíggjarstøða fyri byrjan og endan á rakstrarárinum skulu fylgja við sjálvuppgávuni.

Tá ið heilt serligar orsøkir eru til tess, so sum deyði og sjúka, kann innlatingarfreistin tó verða longd ein mánað í senn, tó ikki út um 15. august 2010. Treytin fyri, at freistin kann verða longd, er, at skrivlig umsókn verður send TAKS í seinasta lagi 7 dagar áðrenn freistin er úti, og at sjálvuppgávur, roknskapir og ognaruppgerðir fyri eldri ár eru innkomin til TAKS.

Um so er, at freistin fyri innlating er ein leygardag, sunnudag ella annan halgidag, er innlatingardagurin ístaðin næsti gerandisdagur. Um sjálvuppgáva ikki verður innlatin rættstundis, verður sekt áløgd við upp til 5.000 kr.

Írestandi skattur

Írestandi skattur hjá persónligum skattgjaldarum skal gjaldast í trimum javnstórum gjøldum hin 1. mai, 1. juni og 1. juli í álíkningarárinum við 4% í eykagjaldi og við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum. Írestandi skattur hjá sjálvstøðugt vinnurekandi fellur til gjaldingar í trimum javnstórum gjøldum hin 1. í hvørjum mánað eftir at skattauppgerðin er útskrivað við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.

Írestandi skattur av kapitalvinningsinntøkum fellur til gjaldingar í einum tann 1. í mánaðinum eftir at uppgerðin er útskrivað við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.

Verður írestandi skattur ikki goldin rættstundis, verða 0,7% roknað í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsdegnum. Sleppast kann undan eykagjaldinum upp á 4%, um hin skattskyldugi í seinasta lagi 31. januar í álíkningarárinum sjálvboðin rindar írestandi skattin á kontu hjá TAKS og tilskilar írestandi skatt, skattaár og p-tal.

Avlopsskattur

Avlopsskattur verður útgoldin áðrenn 1. oktober í álíkningarárinum við 4% í endurgjaldi. Endurgjald verður ikki latið av avlopsskatti, sum stendst av, at hin skattskyldugi sjálvboðið hevur goldið ov nógv í fyribilsskatti. Um afturgjaldingin av avlopsskattinum er eftir 1. oktober, verður renta roknað fyri hvønn byrjaðan mánað við 0,7%.

1.2 Feløg, felagsskapir og deyðsbúgv

Sjálvuppgáva og kapitalvinningssjálvuppgáva

Freistin at innlata vanliga sjálvuppgávu og kapitalvinningssjálvuppgávu fyri inntøkuárið 2009 er 1. juli 2010. Innlatingarfreistin er galdandi fyri øll feløg sum hava inntøkuár, sum fellur saman við, ella endar í álmanakkaárinum 2009. Innlatingarfreistin kann tó leingjast, um serligar orsøkir eru til tess, so sum deyði ella sjúka, tó ikki út um 15. august 2010. Um innlatingardagurin er ein leygardag, sunnudag ella annan halgidag, verður innlatingardagurin ístaðin næsti gerandisdagur.

Skatturin av vanligari skattskyldugari inntøku fellur til gjaldingar í trimum gjøldum hin 1. oktober, 1. november og 1. desember við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum. Skatturin av kapitalvinningsinntøkum fellur til gjaldingar í einum tann 1. í mánaðinum eftir at uppgerðin er útskrivað við gjaldsfreist til 20. í mánaðinum.

Verður skatturin ikki goldin rættstundis, verður renta roknað við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsdegnum.

Vinningsbýtisuppgerð

Feløg, sum útluta vinningsbýti, skulu lata vinningsbýtisuppgerð til TAKS, sum vísir hvussu eftirhildin vinningsbýtisskattur er roknaður. Uppgerðin skal verða latin TAKS í seinasta lagi 14 dagar eftir at avgerð er tikin um at útluta vinningsbýti.

2. Skattatalvur v.m.

2.1 Skattur hjá persónum við fullari skattskyldu

Landsskattur

kr.	2009	2010
Botnfrádráttur	30.000	30.000

Fyri árið 2009 varð landsskatturin roknaður soleiðis:

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður latið kr.	av kr.	og av restini
30.000	70.000	0	30.000	7,0%
70.000	140.000	2.800	70.000	18,0%
140.000	250.000	15.400	140.000	21,0%
250.000		38.500	250.000	33,0%

Fyri árið 2010 verður landsskatturin roknaður soleiðis:

Er inntøkan kr.	men minni enn kr.	verður latið kr.	av kr.	og av restini
30.000	70.000	0	30.000	7,0%
70.000	140.000	2.800	70.000	18,0%
140.000	250.000	15.400	140.000	21,0%
250.000	400.000	38.500	250.000	33,0%
400.000		88.000	400.000	35,0%

Kommunuskattur

Kommunuskattur verður goldin sambært skattaprosentinum í tí kommunu, har tann skattskyldugi hevði fast tilhald fyri seg og húski sítt hin 1. desember í árinum frammanundan inntøkuárinum. Kommunuskattaprosentið verður ásett av tí einstøku kommununi.

Kommunuskatturin verður roknaður av skattskyldugu inntøkuni frádrigið botnfrádráttin.

kr.	2009	2010
Botnfrádráttur	30.000	30.000

Kirkjuskattur

Allir limir í fólkakirkjuni gjalda Landskirkjuskatt, sum verður goldin eftir somu reglum sum kommunuskattur.

Landskirkjuskatturin fyri 2009 og 2010 er 0,60% av skattskyldugu inntøkuni frádrigið botnfrádráttin.

Harumframt kunnu limir í fólkakirkjuni eisini gjalda staðbundnan kirkjuskatt til kirkjusóknina. Staðbundin kirkjuskattur verður álagdur eftir loyvi frá landsstýrismanninum, og kann í mesta lagi verða 0,30% av skattskyldugu inntøkuni frádrigið botnfrádráttin.

Persónar, sum ikki eru limir í fólkakirkjuni, kunnu sjálvbodnir gjalda Landskirkjuskatt við at geva boð til TAKS.

Hýra frá skipum undir FAS

Hýra frá skipum skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá (FAS) verður skattað við føstum skattaprosenti upp á 35%. Hýra frá skipum, sum við ongari manning verða leigað av føroyskum reiðaravirki, og sum annars lúka treytirnar í FAS, verður somuleiðis skattað við føstum skattaprosenti upp á 35%.

Hýra frá útlendskum ferða- og farmaskipum v.m.

Hýra frá útlendskum ferða- ella farmaskipum, umframt løn fyri arbeiðið umborð á útlendskum skipum og øðrum útbúnaði, sum verður nýttur í sambandi við kolvetnisvinnu uttanfyri føroyskt sjóøki, verður skattað við føstum skattaprosenti upp á 35%. Tílík inntøka verður uppgjørd við frádráttum sum víst í petti 3.4.

Hýra frá skipum undir DIS

Hýra frá skipum skrásett í donsku altjóða skipaskránnið (DIS) verður íroknað í skattskyldugu inntøkuna. Samlaði skatturin av allari skattskyldugu inntøkuni verður síðani lækkaður við tí parti sum lutfalsliga fellur á DIS-hýruna. Hetta merkir m.a., at um ein persónur bert hevur DIS-inntøku skal eingin skattur gjaldast.

Inntøka av húsaleigu

Galdandi frá 1. januar 2009 kunnu skattgjaldarar, sum leiga út til bústaðarendamál, velja millum tveir ymiskar hættir at uppgera skattskyldugu inntøkuna av húsaleiguni.

Leiguinntøkan kann uppgerast sambært vanligu reglunum í skattalógini, t.v.s. inntøka við frádrátti av útreiðslum, so sum EL, hiti, trygging og rentur. Um húsini eisini verða nýtt sum bústaður hjá eigaranum kunnu rentuútreiðslur tó ikki frádragast í skattskyldugu inntøkuni. Nettoinntøkan eftir frádráttir verður løgd afturat øðrum skattskyldugum inntøkum.

Skattgjaldarar kunnu eisini velja at uppgera inntøkuna eftir eini bruttoskattaskipan, har tann parturin av leiguinntøkuni, sum fer uppum 24.000 kr. árliga, verður skattaður við 25%. Útreiðslur so sum EL, hiti, trygging og rentur kunnu ikki frádragast í leiguinntøkuni, tá ið hesin háttur verður nýttur.

Skattahámark

Skattahámark	2009	2010
Lands-, kommunu- og kirkjuskattur	50%	52%

2.2 Skattur hjá persónum við avmarkaðari skattskyldu

Lønarinntøkur
Persónar við avmarkaðari skattskyldu, sum bert hava lønarinntøkur (A-inntøkur), gjalda ein samlaðan lands- og kommunuskatt upp á 42%.

B-inntøkur
Persónar við avmarkaðari skattskyldu, sum hava B-inntøku, gjalda vanligan lands- og kommunuskatt, tó ikki kirkjuskatt. Persónar við avmarkaðari skattskyldu, sum hava inntøku av húsaleigu, kunnu tó velja at uppgeva inntøkuna sum brutto inntøku og gjalda 25% í skatti.

Pensjón
Útlendingar, sum fáa pensjón úr Føroyum sambært millumlanda sáttmála um sosiala trygd, gjalda 10% í skatti í Føroyum. Hetta er tó ikki galdandi fyri persónar, sum búgva í Danmark, og sum fáa pensjón úr Føroyum. Tílíkir persónar gjalda ikki skatt í Føroyum av útgoldnu pensjónini.

FAS
Útlendingar sum fáa hýru frá skipum, sum eru skrásett í FAS, gjalda 35% í skatti av bruttoinntøkuni. Útlendingar, sum fáa hýru frá skipum, sum við ongari manning verða leigað av føroyskum reiðaravirki, og sum annars lúka treytirnar í FAS, gjalda somuleiðis 35% í skatti av bruttoinntøkuni.

Kolvetnisvinnan
Hjá útlendingum, sum arbeiða innan kolvetnisvinnuna er skatturin treytaður av, hvørt arbeitt verður fyri føroyskan arbeiðsgevara ella ikki.

	2009	2010
Um útlendingur arbeiðir fyri føroyskan arbeiðsgevara	42%	42%
Um útlendingur arbeiðir fyri útlendskan arbeiðsgevara	35%	35%

Útlendingar, sum hava bústað í øðrum norðurlandi, og sum arbeiða í Føroyum innan kolvetnisvinnuna, og sum uppihalda sær í Føroyum í minni enn 30 dagar innan eitt 12 mánað tíðarskeið, skulu ikki gjalda skatt í Føroyum.

2.3 Partafelagsskattur v.m.

Partafeløg, smápartafeløg, kommanditfeløg, sparikassar, lutafeløg, vinnurekandi grunnar og tryggingarfeløg, sum hava partapening, inngoldnan innskotspening, ábyrgdarpening ella lutapening, ið er 80.000 kr. ella meiri, gjalda 18% í skatti av skattskyldugu inntøkuni. Føroya Realkreditstovnur og Íleggingargrunnurin fyri Føroyar gjalda eisini 18% í skatti av skattskyldugu inntøkuni.

Hjá feløgum, sum eru samskattað, verður øll inntøkan undir samskattingini tald saman og uppgivin undir einum á sjálvuppgávuni hjá móðurfelagnum. Hall frá áðrenn samskatting kann tó einans dragast frá í felagsins egna yvirskoti.

Sambært Kolvetnisskattalógini skulu loyvishavarar gjalda 27% í skatti av inntøku av fyrstu sølu og/ella inntøku, ið er ásett sum ein partur av framleiddum kolvetni. Loyvishavarar skulu eisini gjalda 27% í skatti av vinningi av at lata frá sær loyvi til at leita eftir og framleiða kolvetni. Harumframt kunnu loyvishavarar eisini gjalda framleiðslugjald og serskatt.

2.4 Kapitalvinningsskattur

Kapitalvinningur verður gjørdur upp undir einum og verður skattaður soleiðis:

Kapitalvinningsskattur	2009	2010
Persónar	35%	39%
Feløg	18%	18%

Frá 1. januar 2010 er kapitalvinningsskatturin hjá persónum hækkaður til 39%. Fylgjandi árini lækkar kapitalvinningsskatturin við 1% um árið, soleiðis at frá 1. januar 2014 er kapitalvinningsskatturin hjá persónum aftur komin niður á 35%.

2.5 Tonsaskattaskipanin

Partafeløg og smápartafeløg, sum reka vinnuligt virksemi við at flyta ferðafólk ella góðs (reiðarívirksemi), kunnu velja at verða skattað eftir tonsaskattaskipanini heldur enn eftir vanligu skattalógini. Undir tonsaskattaskipanini verður skattskylduga inntøkan gjørd upp eftir nettotonsatali á skipum sum felagið hevur havt í rakstri í árinum.

Tað eru bert inntøkur, ið stava frá flutningi av ferðafólkum og góðsi umframt frá veitingum, ið hava tætt tilknýti til hesar inntøkur, sum koma undir tonsaskattaskipanina.

Feløg, sum umframt reiðarívirksemi eisini reka annað virksemi, ið skal skattast eftir vanligu reglunum, skulu gera inntøkusløgini upp hvørt sær.

Eftir tonsaskattaskipanini verður skattskylduga inntøkan fyri hvørt skipið ásett til niðanfyrinevndu upphæddir fyri hvørji 100 nettotons (NT) fyri hvørt byrjað samdøgur sum skipið hevur verið í rakstri.

Tonsaskattur	2009 og 2010
Upp í 1.000 NT	6 kr. fyri hvørji 100 NT
Úr 1.000 NT upp í 10.000 NT	4 kr. fyri hvørji 100 NT
Úr 10.000 NT upp í 25.000 NT	3 kr. fyri hvørji 100 NT
Yvir 25.000 NT	1 kr. fyri hvørji 100 NT

Uppgjørda skattskylduga inntøkan verður skattað við vanliga skattaprosentinum fyri partafeløg.

Feløg, sum vilja nýta tonsaskattaskipanina, skulu boða TAKS frá hesum í seinasta lagi, tá ið freistin er úti at lata sjálvuppgávu inn fyri tað inntøkuárið, ið skattingin skal viðvíkja.

Avgerðin at nýta tonsaskattaskipanina er bindandi fyri felagið í trý ár. Fer eitt felag úr skipanini aftur, er tað ikki møguligt at koma inn aftur í skipanina, fyrr enn trý inntøkuár eru farin.

Feløg, sum nýta tonsaskattaskipanina, kunnu ikki verða samskattað við onnur feløg.

2.6 Deyðsbúgv

Deyðsbúgv gjalda 40% í skatti av skattskyldugu inntøkuni. Skattskylduga inntøkan hjá deyðsbúgvum umfatar inntøkur frá andlátsdegnum til endaliga uppgerðardagin. Fyri deyðsbúgv, sum verða skift privat, stendur skattskyldan við til 15 mánaðir frá andlátsdegnum. Hereftir eru arvingarnir skattskyldugir av inntøkunum í mun til teirra ognarlut í búnum. Um endalig búsuppgerð er latin TAKS innan 15 mánaðir eftir andlátið, hevur búgvið rætt til frádrátt upp á 25.000 kr. í skattskyldugu inntøkuni.

2.7 Arvaavgjald

Arvaavgjaldið verður roknað sum ein ávísur prosentpartur av móttikna arvinum sambært niðanfyristandandi yvirliti.

Arvur kr.	Bólkur A	Bólkur B	Bólkur C	Bólkur D
Undir 1.000	1,00%	4,00%	7,00%	10,00%
1.001-2.000	1,25%	4,25%	7,25%	10,25%
2.001-3000	1,50%	4,50%	7,50%	10,50%
3.001-5.000	1,75%	4,75%	7,75%	10,75%
5.001-10.000	2,00%	5,00%	8,00%	11,00%
10.001-20.000	2,25%	5,25%	8,25%	11,25%
20.001-50.000	2,50%	5,50%	8,50%	11,50%
50.001-100.000	2,75%	5,75%	8,75%	11,75%
Yvir 100.000	3,00%	6,00%	9,00%	12,00%

Bólkur A: Hjúnafelagi, børn ella ættleitt børn.

Bólkur B: Foreldur ella arvingar hjá hesum, um so er, at teir ikki koma undir klassa A.

Bólkur C: Ommur og abbar ella arvingar hjá hesum.

Bólkur D: Longri úti í familju ella persónar, ið ikki eru í ætt.

Av arvi til statin, kirkjur, kommunur, feløg, stovnar, legatir og líknandi skulu 10% gjaldast í avgjaldi.

3. Frádráttir í skattskyldugu inntøkuni

3.1 Eftirlønarskipanir

Viðvíkjandi frádrátti fyri inngjøld til eftirlønarskipanir verður víst til petti 6.

3.2 Arbeiði uttanlands ella umborð á útlendskum skipi

Persónar við fullari skattskyldu, sum hava inntøkugevandi arbeiði uttanlands ella umborð á útlendskum skipi, hava rætt til frádrátt fyri partar av meirútreiðslum til kost, húsaleigu, ferðing, flutning og sjúkra- og vanlukkutrygging. Talan er um ein samdøgursfrádrátt, sum er treytaður av, at dvølurin uttanlands er antin 2 mánaðir uttan slit ella í minsta lagi 100 samdøgur innan fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið.

Samdøgursfrádrátturin fyri meirútreiðslur umborð á útlendskum skipi og fyri arbeiði í útlondum er:

Samdøgursfrádráttur	2009	2010
kr.	300	300

Skattgjaldarin hevur skyldu til at rokna ta løn, hann hevur vunnið í útlandinum ella umborð á útlendskum skipi við í føroysku skattskyldugu inntøkuna. Um skattgjaldarin hevur fingið ferðaútreiðslur goldnar av arbeiðsgevaranum, skal virðið av hesum útreiðslunum leggjast afturat skattskyldugu inntøkuni.

Skjalprógv fyri inntøku og dagatal uttanlands skulu latast inn til TAKS saman við sjálvuppgávuni. Uttanlandsinntøkan verður uppgivin á serligum oyðublaði, sum verður innsent saman við sjálvuppgávuni.

3.3 Fiskiveiðuinntøka

Fiskiveiðuinntøka verður lækkað við 14%, áðrenn skattur verður lagdur á inntøkuna. Tó er hægsti árligi frádrátturin 65.800 kr. svarandi til 14% av 470.000 kr. Frádrátturin er galdandi fyri alla fiskiveiðuinntøku, bæði frá føroyskum og útlendskum fiskiskipum.

3.4 Hýra frá útlendskum skipum, undantikið fiskiskipum

Hjá persónum, sum fáa hýru frá útlendskum ferða- ella farmaskipum, ella fáa hýru frá útlendskum skipum ella øðrum útbúnaði, sum verður nýttur í kolvetnisvinnu uttanfyri føroyskt sjóøki, verður skattskylduga inntøkan lækkað við niðanfyristandandi frádráttum.

kr.	2009	2010
Fastur frádráttur í hýruni er	50.000 kr.	50.000
+ 15% av hýruni upp til	200.000 kr.	200.000
+ 8% av restini upp til	350.000 kr.	350.000
Hægsti árligi frádrátturin er	92.000 kr.	92.000

Omanfyrinevndu frádráttir eru ikki galdandi fyri hýrur frá skipum sum eru skrásett í DIS skipanini.

Um hýran bert er fyri ein part av árinum, verður frádrátturin lækkaður lutfalsliga. Lækkaða skattskylduga inntøkan verður skattað við 35%.

3.5 Skattligt hall

Hall í uppgerðini av vanligu skattskyldugu inntøkuni kann flytast fram til frádrátt í vanligari skattskyldugari inntøku í komandi árum. Á sama hátt kann hall í uppgerðini av kapitalvinningsinntøkuni flytast fram til frádrátt í kapitalvinningsinntøku í komandi árum.

Hjá feløgum og grunnum kann kapitalvinningsinntøka flytast til uppgerðina av vanligu skattskyldugu inntøkuni í tann mun henda seinna vísir hall. Hall í uppgerðini av vanligu skattskyldugu inntøkuni kann í hesum førum vera hall, sum er staðfest í árinum, ella framflutt hall frá undanfarnum árum.

Hall í uppgerðini av kapitalvinningsinntøkuni kann hinvegin ikki mótroknast í vanligari skattskyldugari inntøku.

Persónar kunnu ikki flyta hall í skattskyldugu inntøkuni til mótrokning í kapitalvinningsinntøku.

3.6 Rentufrádráttur

Feløg og vinnuvirki annars kunnu draga allar vinnuligar rentur frá í skattskyldugu inntøkuni. Rentur av útistandandi skatti, ov seint goldnum skatti, tolli og avgjaldi kunnu tó ikki dragast frá.

Rentuútreiðslur, sum eru komnar til gjaldingar í einum inntøkuári, og sum felagið hevur drigið frá, men ikki goldið við endan av næstkomandi inntøkuári, verða inntøkuførdar í tí álmanakkaári, renturnar eru komnar til gjaldingar. Rentuútreiðslurnar metast at vera goldnar, um so er, at tær av einum peningastovni eru afturatskrivaðar kassakredittinum ella líknandi millumverandi, uttan at kreditturin fer upp um hámarkið við ársbyrjan.

Í uppgerðini av kapitalvinningsinntøkuni kunnu likamligir

persónar draga frá rentur, sum stava frá lántøku í peningastovnum o.ø., um lánið verður nýtt til keyp av virðisbrøvum. Aðrar rentuútreiðslur eru ikki frádráttarloyvdar, men eftir umsókn verður rentustuðul veittur fyri rentur av láni til m.a. egnan bústað, sí. petti 9.1.

3.7 Hjúnafrádráttur

Um skattskylduga inntøkan hjá øðrum hjúnafelaganum er undir skattafría botnfrádráttin (30.000 kr.), og inntøkan hjá hinum hjúnafelaganum er yvir skattafría botnfrádráttin, verður ein javning gjørd, soleiðis at tann lægra inntøkan verður hækkað upp til skattafría botnfrádráttin, meðan inntøkan hjá hinum hjúnafelaganum verður lækkað í sama mun.

Tílík javning verður eisini gjørd í inntøkunum í tann mun annar hjúnafelagin møguliga hevur hall í skattskyldugu inntøkuni.

4. Frádráttir í skattinum

4.1 Barnafrádráttur

Fyri hvørt barnið undir 18 ár, ið ein persónur hevur foreldramyndugleikan yvir, verður givin ein frádráttur í lands- og kommunuskattinum. Hjá hjúnum hevur maðurin sum útgangsstøði frádráttin, tó so at sambúgvandi hjún kunnu sjálvi gera av, hvør teirra skal hava frádráttin.

Um hjún slíta sambúgvið, fær tann hjúnafelagin, sum hevur børnini búgvandi, frádráttin frá flytingardegnum.

Tá ið børnini ikki búgva hjá tí persóni, sum hevur foreldramyndugleikan yvir teimum, kann barnafrádrátturin í staðin veitast tí persóni, sum hevur børnini búgvandi. Tó fellur barnafrádrátturin burtur, tá ið barnaverndarnevnd hevur yvirtikið umsorgan av børnum.

kr.	2009	2010
Landsskattur	5.500	5.500
Kommunuskattur	3.000 - 7.000	3.000 - 7.000

Einstøku kommunurnar áseta sjálvar barnafrádráttin í kommunuskattinum. Persónur fær barnafrádrátt í kommunuskattinum samsvarandi tí kommunu, har hann hevði bústað tann 1. desember í árinum frammanundan álíkningarárinum.

Um barnafrádrátturin er hægri enn skatturin uttan barnafrádrátt, verður munurin útgoldin avvarðandi skattgjaldara, tá ið endaliga skattauppgerðin verður gjørd.

4.2 Pensjónsfrádráttur

Fyritíðarpensjónistar, umframt tey sum fáa hjálp eftir grein 13 í forsorgarlógini, fáa ein frádrátt í útroknaða landsskattinum.

kr.	2009	2010
Stakur persónur	16.200	16.200
Hjún (fyri hvønn)	10.500	10.500

Um frádrátturin ikki rúmast í landsskattinum, verður restupphæddin frádrigin í kommunuskattinum. Óbrúktur frádráttur, sum ikki rúmast í lands- og kommunuskatti, fellur burtur.

4.3 Frádráttur fyri goldnan skatt uttanlands

Um persónur við fullari skattskyldu hevur goldið skatt uttanlands, antin sambært ásetingum í tvískattasáttmála, ella sambært innanhýsis reglum í øðrum landi, verður ein frádráttur givin í føroyska skattinum, svarandi til tann skatt, sum álíknaður verður í Føroyum av útlendsku inntøkuni.

Í ávísum førum kann frádrátturin í Føroyum tó ongantíð verða hægri enn tann skattur, sum veruliga er goldin í útlandinum.

5. Ágóðar, endurgjøld og serligar inntøkur

5.1 Gávur

Gávur eru skattskyldugar sum vanlig skattskyldug inntøka hjá móttakaranum, tó undantikið gávur frá hjúnafelaga, foreldrum, abbum, ommum og børnum.

Gávur í peningi og gávukort frá arbeiðsgevara skulu skattast uttan mun til upphæddina. Aðrar gávur í sambandi við serstakt høvi verða ikki skattaðar, um keypsprísurin íroknað meirvirðisgjald er 1.500 kr. ella minni. Er keypsprísurin íroknað meirvirðisgjald yvir 1.500 kr., skal skattur gjaldast av allari upphæddini.

5.2 Starvsfólkaágóðar

Persónar, sum fáa niðanfyrinevndu ágóðar frá arbeiðsgevaranum, skulu skattast av virðinum á ágóðunum.

kr.	2009	2010
Virðið á fríum bústaði m^2	881	835
Frítt EL	8.400	8.100
Frí olja	21.500	18.100
Frítt telesamskifti	5.000	5.800
Virðið av fríum kosti pr. dag		
3 máltíðir	57	58
2 máltíðir	43	44
1 máltíð	31	32
Virðið av fríum bili (persónvognar)		
1.100 kg og undir	55.400	55.100
1.101 kg. – 1.300 kg	66.900	66.500
1.301 kg. – 1.500 kg	77.500	79.900
1.501 kg. og meira	89.700	89.400
Virðið av fríum bili (vøruvognar)		
1.100 kg og undir	33.240	33.060
1.101 kg. – 1.300 kg	40.140	39.900
1.301 kg. – 1.500 kg	46.500	47.940
1.501 kg. og meira	53.820	53.640
Bussar upp til 10 persónar, nýttir til hýruvognskoyring	18.500	18.400

Um persónur, hjúnafelagi ella sambúgvi hansara hevur egnar útreiðslur til telesamskifti, kunnu hesar útreiðslur mótroknast í virðinum av fríum telesamskifti frá arbeiðsgevaranum.

Virðið á fríum bili er roknað at svara til privata koyring upp á 10.000 km árliga. Kann starvsfólkið prógva, t.d. við koyribók, at privata koyringin er minni enn 10.000 km, kann upphæddin lækkast samsvarandi.

5.3 Eginnýtsla hjá privatum vinnurekandi

Privatur vinnurekandi skal skattast av virðinum á vørum og framleiðslum, sum hann tekur úr virkinum at nýta ella at hava í húsarhaldi sínum ella til gávur. Somuleiðis skal viðkomandi skattast av tí partinum av útreiðslunum, sum svarar til eginnýtsluna fyri t.d. bil, telefon, ljós og hita, har útreiðslurnar umfata bæði privatu og vinnuligu nýtsluna.

Eginnýtslan fyri nýtslu av vørum er ásett til niðanfyristandandi leiðbeinandi virði. Ásettu upphæddirnar eru fyri hvønn vaksnan persón í húsarhaldinum. Fyri børn er upphæddin helvtin av ásettu upphæddini fyri vaksin.

Eginnýtsla av vørum í kr.	2009	2010
Handilsmenn	15.500	15.800
Bakarar	4.900	5.000
Bakarar við handilsvørum	12.700	13.100

Sum árligt minstamark fyri privata nýtslu av bili hjá hýruvognsførarum er ásett:

kr.	2009	2010
Hýruvognsførari	18.500	18.400

5.4 Endurgjald fyri egnan bil

Persónur, sum nýtir egnan bil í arbeiðsørindum fyri arbeiðsgevaran, kann fáa skattafrítt endurgjald sambært reglunum hjá tí almenna.

kr.	2009	2010
	3,20 pr. km	3,20 pr. km

Koyring millum heim og arbeiðsstað verður ikki roknað sum koyring í arbeiðsørindum.

Arbeiðsgevarin hevur skyldu til at ansa eftir, at endurgjaldið samsvarar við koyrdar kilometrar. Roknskapur fyri hvussu nógv er koyrt, skal gerast javnan og í minsta lagi eina ferð um mánaðin. Roknskapurin skal vera til skjals í bókhaldi arbeiðsgevarans.

Endurgjald út um omanfyrinevndu upphæddir er vanlig skattskyldug inntøka.

5.5 Endurgjald fyri egna telefon

Skattafrítt endurgjald fyri at nýta egna telefon í tænastu fyri arbeiðsgevara:

kr.	2009	2010
Fast árligt gjald	1.380	1.380
+ samrøður, árliga	1.000	1.000
Til samans	2.380	2.380

Endurgjald, sum er hægri enn omanfyrinevnda upphædd, tó hægst ájavnt við samlaðu telefonrokningina, er at rokna sum frí telefon, og skal skattast sum frí telefon. Verður endurgoldið meira enn svarandi til telefonrokningina, er upphæddin omanfyri samlaðu telefonrokningina A-inntøka, sum skal verða ávíst um afturhaldsskipanina.

5.6 Dagpeningur og náttarviðbót

Arbeiðsørindi í Føroyum

Tá ið løntakari ferðast í Føroyum í ørindum fyri arbeiðsgevara, kann hann fáa niðanfyrinevndu upphæddir útgoldnar skattafrítt.

Føroyar kr.	2009	2010
Tímapeningur	15	15
Fullur dagpeningur	250	250
Gjald fyri innivist eftir rokning, tó í mesta lagi	650	650
Náttarviðbót, ikki skjalprógvað	230	230
Lækkaður dagpeningur, tá ið farið verður út um 28 dagar	212	212
Av hesum náttarviðbót	106	106

Treytirnar fyri at gjøldini kunnu veitast skattafrítt eru, at ferðin varar longri enn 4 tímar, og at ferðast verður longri enn 4 km frá arbeiðsstaðnum. Vanliga verður ikki latin dag- og tímapeningur innan fyri somu kommunu.

Tað eru bert starvsfólk, sum ferðast í arbeiðsørindum burtur frá føstum arbeiðsstaði, sum hava rætt til dagpening og náttarviðbót. Fastur arbeiðsstaður er t.d. kontór, bygningur,

verkstaður ella líknandi – t.v.s. ein staður har starvsfólkini halda til dagliga.

Tá starvsfólk hava skiftandi arbeiðsstøð og ferðast til hesi skiftandi arbeiðsstøð, verður hetta ikki roknað sum ferðing í arbeiðsørindum, og hava tílík starvsfólk tískil ikki rætt til dagpening og náttarviðbót.

Dagpeningur verður roknaður fyri hvørt samdøgur, sum løntakarin er burturstaddur frá fasta arbeiðsplássinum. Er ferðin styttri enn 16 tímar, verður tímapeningur roknaður fyri hvønn ásettan tíma. Er hon longri, verður dagpeningur latin í staðin.

Dagpeningur og náttarviðbót skulu gjaldast afturat lønini. Tað er sostatt ikki loyvt at mótrokna dagpening og náttarviðbót í skattskyldugari løn.

Arbeiðsørindi í Danmark

Tá ið løntakari ferðast í Danmark í ørindum fyri arbeiðsgevara, kann hann fáa niðanfyrinevndu upphæddir útgoldnar skattafrítt.

Danmark kr.	2009	2010
Dagviðbót	360	360
Dagviðbót, heimferðardagin	200	200
Gjald fyri innivist eftir rokning, í mesta lagi	745 / 905	805 / 970
Náttarviðbót, tá eingin gistingarhúsrokning fyriliggur	250	250

Galdandi frá 12. august 2009 verður goldið fyri innivist á hotelli eftir rokning í mesta lagi 805 kr. fyri hvørja nátt. Tó verður í høvuðsstaðarumráðinum goldið í mesta lagi 970 kr. fyri hvørja nátt.

Full viðbót verður veitt upp til 28 dagar. Aftaná 28 dagar verður avtala gjørd um viðbót í hvørjum einstøkum føri.

Arbeiðsørindi í øðrum londum

Uttanfyri Danmark verður endurgoldið fyri hotellrokning. Við hotellrokning verður bert roknað við gisting. Er morgunmatur íroknaður, og ikki kann fáast at vita, hvat hann kostar, verða 15% drigin frá dagpeninginum.

Dagpeningur kann veitast sambært upphæddum hjá uttanríkisráðnum. Upphæddirnar fyri dagpening uttan fyri Danmark eru at finna á heimasíðuni hjá Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum www.lnd.fo.

Endurgjald út um tær av uttanríkisráðnum ásettu upphæddir er skattskyldugt sum vanlig inntøka.

6. Eftirlønarskipanir

6.1 Eftirlønarskipanir

Eftirlønarskipanir kunnu stovnast sum:

1. arbeiðsgevaraeftirlønarskipanir, har antin arbeiðsgevarin einsamallur, ella arbeiðsgevarin og løntakarin gjalda til skipanina, ella
2. privatar skipanir, har eigarin einsamallur rindar til skipanina.

Gjøld, sum arbeiðsgevarin rindar til eina arbeiðsgevaraskipan skulu ikki roknast við í skattskyldugu inntøkuna hjá løntakaranum. Sama er galdandi, um arbeiðsgevarin rindar løntakarans part av inngjøldunum beinleiðis til eftirlønarskipanina.

Um løntakarin sjálvur rindar sín part av inngjaldinum – tað veri seg til eina arbeiðsgevaraskipan ella privata skipan – er inngjaldið frádráttarloyvt, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp.

Øll inngjøld til føroyskar eftirlønarskipanir verða á hvørjum ári fráboðaðar elektronisk til TAKS av viðkomandi tryggingarfelag, peningastovni ella eftirlønargrunni.

6.2 Eftirlønarskipan við stigvísari útgjalding

Ein eftirlønarskipan við stigvísum útgjaldingum er ein eftirlønarskipan, sum verður útgoldin stigvíst og sum fellur burtur, tá ið tann, sum hevur rætt til eftirlønina, doyr.

Reglulig inngjøld – antin sum prosentpartur av lønum ella sum fast mánaðarligt/árligt gjald – kunnu fult út verða drigin frá í skattskyldugu inntøkuni. Kapitalinngjøld til eina eftirlønarskipan við stigvísari útgjalding kunnu ikki verða drigin frá í einum, men skulu dragast frá í eins stórum upphæddum yvir eitt 10-ára skeið.

Útgjald frá eftirlønarskipan við stigvísari útgjalding er vanlig skattskyldug inntøka. Um eftirlønarskipan við stigvísum útgjøldum verður útgoldin í einum, er útgoldna upphæddin ikki skattskyldug inntøka, men skulu í staðin gjaldast 55% í avgjaldi.

Um byrjað er at útgjalda frá eftirlønarskipan við stigvísari útgjalding, ber ikki til at gjalda innaftur á somu eftirlønarskipan. Hetta er tó ikki galdandi í sambandi við útgjald av avlamiseftirløn.

6.3 Eftirlønarskipan við lutaútgjalding

Ein lutaeftirlønarskipan er ein eftirlønarskipan, har tryggingarupphæddin verður útgoldin í eins stórum lutum í 10 ár.

Galdandi frá 1. januar 2010 kunnu inngjøld – antin sum prosentpartur av lønum ella sum fast mánaðarligt/árligt gjald – verða frádrigin í skattskyldugu inntøkuni við upp til 100.000 kr. um árið.

Útgjøld av lutaeftirlønarskipan eru vanlig skattskyldug inntøka. Um lutaeftirlønarskipan verður útgoldin í einum, er útgoldna upphæddin ikki skattskyldug inntøka, men skulu í staðin gjaldast 55% í avgjaldi. Ov nógv inngoldin upphædd, sum ikki gevur frádrátt í skattskyldugu inntøkuni fyri 2010, kann útgjaldast aftur uttan avgjald.

Um byrjað er at útgjalda frá lutaeftirlønarskipan, ber ikki til at gjalda innaftur á somu eftirlønarskipan. Hetta er tó ikki galdandi í sambandi við útgjald av avlamiseftirløn.

6.4 Eftirlønarskipan við kapitalútgjalding

Ein eftirlønarskipan við kapitalútgjalding, er ein eftirlønarskipan, ið sum meginregla verður útgoldin við einari kapitalupphædd. Kapitaleftirlønarskipan kann tó eisini útgjaldast í lutum.

kr.	2009	2010
Inngjøld kunnu verða frádrigin við	50.600	25.000

Frá og við tí ári, tá ið persónur verður 70 ár, kunnu inngjøld til privat teknaðar kapitaleftirlønarskipanir ikki frádragast í skattskyldugu inntøkuni. Um byrjað er at útgjalda frá kapitaleftirlønarskipan, ber ikki til at gjalda innaftur á somu eftirlønarskipan. Hetta er tó ikki galdandi í sambandi við útgjald av avlamiseftirløn.

Útgjald av eini kapitaleftirlønarskipan verður skattað við avgjaldi upp á 35%. Um kapitaleftirlønarskipan verður útgoldin áðrenn 60 ára aldur, og talan ikki er um útgjald vegna deyða ella viðvarandi óarbeiðsføri, skulu 55% gjaldast í avgjaldi.

6.5 Skiftisreglur fyri árini 2006 - 2009

Persónar, sum fyri árini 2006 og 2007, hava goldið meira inn á kapitaleftirlønarskipanir enn hægst loyvda frádrátt fyri hesi ár, hava møguleika fyri at flyta ov nógv inngoldnu upphæddina inn á lutaeftirlønarskipan, verandi ella nýstovnað. Um ov nógv inngoldna upphæddin ikki er flutt til eina lutaeftirlønarskipan í seinasta lagi tann 1. oktober 2010, verður upphæddin útgoldin við avgjaldi upp á 55 %.

Persónar, sum fyri árini 2008 og 2009, hava goldið meira

inn á kapitaleftirlønarskipanir enn hægst loyvda frádrátt fyri hesi ár, kunnu fáa ov nógv inngoldnu upphæddina útgoldna uttan at rinda avgjald. Útgjaldið skal verða gjørt fyri 1. oktober 2010.

6.6 Útlendskar eftirlønarskipanir

Inngjøld til útlendskar eftirlønarskipanir kunnu frádragast í skattskyldugu inntøkuni á sama hátt sum inngjøld til føroyskar eftirlønarskipanir, treytað av at útlendska eftirlønarskipanin lýkur treytirnar í føroysku rentutryggingarlógini.

Stigvís útgjøld frá útlendskum eftirlønarskipanum verða íroknað í skattskyldugu inntøkuna í Føroyum, tó so at frádráttur verður givin í føroyska skattinum fyri goldnan skatt uttanlands. Frádrátturin í føroyska skattinum kann tó ongantíð verða størri enn tann skattur, sum í Føroyum verður álíknaður av útlendsku eftirlønini.

Stigvís útgjøld frá donskum eftirlønarskipanum kunnu bert verða skattað í Føroyum, t.v.s. at eingin skattur skal gjaldast í Danmark av útgjøldum frá tílíkum eftirlønum. Persónar, sum fáa stigvís útgjøld frá danskari eftirlønarskipan, hava møguleika fyri at fáa egi v-tal frá TAKS, og kunnu harvið fáa donsku eftirlønina skattaða sum A-inntøku í Føroyum.

Kapitaleftirlønargjøld frá donskum eftirlønarskipanum verða sum útgangsstøði skattað í Danmark sambært donskum reglum. Persónur, sum fær útgoldið kapitaleftirløn úr Danmark, hevur tó møguleika fyri at fáa afturgoldið ein part av danska avgjaldinum. Um einki avgjald verður eftirhildið í Danmark, verður avgjald goldið í Føroyum eftir somu reglum sum galdandi fyri føroyskar eftirlønarskipanir.

7. Av- og niðurskrivingar

7.1 Salduavskrivingar

	2009	2010
Maskinur, innbúgv og tílík rakstrartól, sum verða nýtt vinnuliga burturav, verða árliga avskrivað undir einum við í mesta lagi	30%	30%
Persónbilur, sum verður nýttur vinnuliga burturav, kann avskrivast av í mesta lagi 150.000 kr.	30%	30%
Maskinur, innbúgv og tílík rakstrartól, sum verða nýtt bæði í vinnu og til eginnýtslu, verða árliga avskrivað hvørt sær av í mesta lagi 150.000 kr.	30%	30%
Skip til vinnuliga nýtslu, íroknað veiðuloyvi, verða árliga avskrivað við í mesta lagi	30%	30%

Um útveganarpeningurin fyri maskinur og rakstrartól er 20.000 kr. ella lægri, kann útveganarpeningurin verða fult frádrigin tað árið, útveganin fer fram. Er avskrivingarbæra salduvirðið, áðrenn inntøkuársins avskriving, 20.000 kr. ella lægri, kann upphæddin til fulnar verða frádrigin.

Útreiðslur til ritbúnað (software) kunnu dragast frá sum rakstrarútreiðslur í útveganarárinum uttan mun til upphædd.

Keypspeningur fyri fiskidagar og fiskikvotur eftir lóg um vinnuligan fiskiskap kann somuleiðis frádragast sum rakstrarútreiðsla í útveganarárinum uttan mun til upphædd.

7.2 Eins stórar avskrivingar hvørt árið

	2009	2010
Handverks- og ídnaðarbygningar, íroknað neyðug goymsluhøli,		
• fyrstu 10 árini upp til	7%	7%
• síðani upp til	2%	2%
Skrivstovu- og goymslubygningar,		
• fyrstu 10 árini upp til	4%	4%
• síðani upp til	1%	1%
Goodwill	10%	10%
Onnur immateriell aktiv	10%	10%
Forskotsavskriving av skipi til vinnuliga nýtslu	15%	15%
Innrættingar og innleggingar í leigaðum hølum	Leigutíðin, min. 10 ár	

Avskrivingarnar verða fyri hvørt ár gjørdar av upprunaliga útveganarvirðinum. Forskotsavskrivingar av skipi til vinnuliga nýtslu kunnu tó í mesta lagi verða til samans 45% av byggikostnaðinum.

7.3 Vinningur og afturvunnar avskrivingar

Tá ið salda verður negativ í sambandi við sølu av rakstrartóli ella skipi, skal negativa upphæddin verða roknað uppí skattskyldugu inntøkuna í seinasta lagi árið eftir at saldoin gjørdist negativ.

Tá bygningur verður seldur, sum kundi verið avskrivaður, skulu vinningur og gjørdar avskrivingar roknast upp í skattskyldugu inntøkuna. Fyri bygningar til handverk og ídnað skulu vinningur og afturvunnar avskrivingar roknaðast uppí skattskyldugu inntøkuna í seinasta lagi árið eftir at bygningurin varð seldur. Fyri aðrar bygningar skulu vinningur og afturvunnar avskrivingar roknast uppí skattskyldugu inntøkuna í søluárinum.

Tá vinningur við sølu av bygningi verður uppgjørdur, skal útveganarvirðið fyri bygningin prístalsregulerast fram til seinasta ásetta prístal undan søludegnum. TAKS ásetir nýggj prístøl fyri hvønn ársfjórðing.

Fyri bygningar, sum eru útvegaðir áðrenn 1950, skulu bert gjørdar avskrivingar roknast upp í skattskyldugu inntøkuna.

Mótrokning í nýútvegan

Í sambandi við sølu av skipum, rakstrartólum ella bygningum til handverk og ídnað, kunnu vinningur og afturvunnar avskrivngar, í staðin fyri at verða roknað uppí skattskyldugu inntøkuna, verða mótroknað í nýútvegan av øðrum skipum, rakstrartólum ella bygningum til handverk og ídnað.

Vinningur við sølu av:	Kann mótroknast í nýútvegan av:
Skipum	• Skipum • Rakstrartólum • Bygningum til handverk og ídnað
Rakstrartólum	• Rakstrartólum • Bygningum til handverk og ídnað
Bygningum til handverk og ídnað	• Bygningum til handverk og ídnað • Rakstrartólum

Vinningur og afturvunnar avskrivingar við sølu av øðrum bygningum kunnu ikki mótroknast í aðrari nýútvegan.

Fyri at kunna mótrokna vinning og afturvunnar avskrivingar í nýútvegan, skal nýútveganin fara fram í seinasta lagi

við endan av næstkomandi inntøkuári. Tá ið heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann TAKS leingja freistina fyri nýútvegan. Loyvi til leingjan av freistini er treytað av, at trygd verður veitt fyri skattgjaldingini.

7.4 Avskriving av tapi upp á skuldarar

Tap upp á skuldarar kann dragast frá í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni í tí árinum, vissa er fingin fyri, at peningurin er mistur.

Neyðug vissa fyri, at peningurin er mistur er fingin, tá ið:

- ein verulig og ítøkilig roynd er gjørd at fáa peningin inn, t.d. við at senda kravið til innheintingar og úttøka er til fánýtis,
- skuldarin er farin á húsagang, í gjaldsteðg, í insolventa avtøku, er rýmdur av landinum ella annað tílíkt,
- kravið eftir ítøkiligari meting verður hildið at vera mist heilt ella partvíst.

Áogn, sum er undir 3.000 kr., og sum er eldri enn 3 ár, kann dragast frá, hóast vissa ikki er fyri, at peningurin er endaliga mistur.

7.5 Niðurskriving av vørugoymslum

Tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp, kunnu vørugoymslurnar virðismetast til dagsvirði ella kostvirði.

Kostvirðið á keyptum vørum er veruligi keypskostnaðurin íroknað farmagjald, toll, koyring og annan kostnað í hesum sambandi. Dagsvirðið á keyptum vørum er keypsvirðið, íroknað farmagjald, toll og koyring v.m. á fíggjarstøðudegnum.

Vørur, sum verða framleiddar á egnum virki, skulu virðisásetast til beinleiðis útreiðslur, herundir pakkitilfar, lønir og orkunýtslu. Harumframt kunnu óbeinleiðis útreiðslur so sum umsiting, húsaleiga, avskrivingar v.m. verða roknaðar uppí.

Tá ið virðið á vørugoymslum verður gjørt upp, kunnu illa seljandi vørur setast til tað virðið, sum tær ætlandi kunnu seljast fyri fíggjarstøðudagin.

Møguleiki er eisini fyri at virðisáseta goymsluna til niðanfyri standandi prosentir av tí virði, ið vørurnar vóru mettar til við byrjan av roknskaparárinum.

	2009	2010
1. árið	50%	50%
2. árið	25%	25%
3. árið	0%	0%

8. Kapitalvinningsinntøka

Øll, sum hava kapitalvinningsinntøku, skulu saman við vanligu sjálvuppgávuni lata skattavaldinum eina kapitalvinningssjálvuppgávu. Hjá persónligum skattgjaldarum er kapitalvinningssjálvuppgávan prentað á sama oyðublað sum vanliga sjálvuppgávan. Persónligir skattgjaldarar kunnu eisini lata inn kapitalvinningssjálvuppgávu umvegis internetið, sí petti 1.1.

Sum kapitalvinningsinntøka verður roknað:

- vinningur og tap við avhending av partabrøvum, íløguprógvum v.m.
- vinningur og tap við avhending av lánsbrøvum v.m.
- vinningur og tap í sambandi við eftirgeving av skuld
- vinningsbýti hjá persónum
- rentuinntøka hjá persónum

Í kapitalvinningsuppgerðini verður allur vinningur og øll tap, sum eru skattskyldug sambært kapitalvinningsskattalógini, løgd saman og skattað undir einum við:

Kapitalvinningsskattur	2009	2010
Feløg	18%	18%
Persónar	35%	39%

Vísir uppgerðin hall tað eina árið, kann hallið dragast frá í kapitalvinningsinntøku í komandi árum.

Hjá feløgum og grunnum v.m. kann hall í vanligu skattskyldugu inntøkuni mótroknast í kapitalvinningsinntøku. Tað er tó bert so stórur partur av kapitalvinningsinntøkuni, sum dekkar hall í vanligu skattskyldugu inntøkuni, sum kann nýtast til mótrokning. Hall í uppgerðini av vanligu skattskyldugu inntøkuni kann í hesum førum vera hall, sum er staðfest í árinum, ella framflutt hall frá undanfarnum árum.

Hall í kapitalvinningsinntøkuni kann hinvegin ikki mótroknast í vanligari skattskyldugari inntøku.

Persónligir skattgjaldarar kunnu ikki flyta hall í vanligu skattskyldugu inntøkuni til mótrokning í kapitalvinningsinntøku.

8.1 Vinningur og tap við avhending av partabrøvum

Vinningur og tap við avhending av partabrøvum verða roknað uppí kapitalvinningsinntøkuna uttan mun til ognar-

tíðina av partabrævinum. Vinningurin ella tapið verður uppgjørt sum munurin millum útveganarupphæddina og avhendingarupphæddina fyri avvarðandi partabrøv.

Útreiðslur í sambandi við keyp av partabrøvum kunnu leggjast afturat útveganarvirðinum, meðan útreiðslur í sambandi við sølu kunnu dragast frá søluvirðinum. Talan kann t.d. vera um søluprovisjón ella útreiðslur til sakførara ella grannskoðara.

Fyri partabrøv sum eru útvegað áðrenn 16. november 2001 er tað bert tann virðisøking, sum er staðfest 1. januar 2007 og seinni, sum er skattskyldug. Skattskyldugur vinningur, sum er staðfestur 1. januar 2007 ella seinni, verður roknaður út frá muninum millum avhendingarupphædd og handilsvirðið, sum partabrøvini høvdu tann 31. desember 2006.

Um partaeigari eigur fleiri partabrøv við somu rættindum í sama felag verða tey fyrst útvegaðu roknað sum fyrst avhendað (FIFO-prinsippið). Frípartabrøv verða roknað sum útvegað fyri 0 kr.

Avhending til familju

Høvuðspartaeigari kann lata partabrøv til børn, barnabørn, systkin, børn hjá systkjum ella barnabørn hjá systkjum, uttan at hetta verður viðgjørt sum søla hjá honum. Í tílíkum førum kemur móttakarin av partabrøvunum skattliga í staðið hjá avhendaranum. Tá vinningur ella tap hjá móttakaranum seinni verður uppgjørt við avhendan av partabrøvunum, skulu partabrøvini roknast sum útvegað fyri ta útveganarupphædd, tey vóru fingin til vega av avhendaranum.

Reglan er bert galdandi fyri partaeigarar, sum eiga 25% ella meira av partapeninginum, ella sum ráða yvir meira enn 50% av atkvøðuvirðinum.

Fráboðan um at móttakarin kemur í avhendarans stað skal fráboðast TAKS í seinasta lagi tá ið sjálvuppgávan hjá avhendaranum verður latin inn.

Avhending til útskrivandi felag

Tá ið partabrøv verða seld til útskrivandi felag, t.e. tað felagið sum hevur givið partabrøvini út, skal øll søluupphæddin, uttan frádrátt fyri útveganarupphædd, roknast sum vinningsbýti. Toll- og Skattaráðið kann tó eftir umsókn loyva, at sølan verður viðgjørd eftir reglunum fyri sølu av partabrøvum, t.v.s. at vinningur ella tap verða uppgjørd sum avhendingarupphædd við frádrátti av útveganarupphædd.

Niðurskriving av partapeningi

Niðurskriving av partapeninginum verður sum útgangsstøði roknað sum vinningsbýti, eisini í teimum førum har einki verður útlutað til partaeigaran. Toll- og Skattaráðið kann tó eftir umsókn loyva, at niðurskrivingin verður viðgjørd eftir reglunum fyri sølu av partabrøvum, t.v.s. at vinningur ella tap verða uppgjørd sum útlutaða upphæddin við frádrátti av útveganarupphædd fyri avvarðandi partabrøv.

Avtøka av felagi

Tá ið felag verður avtikið, verða upphæddir, útlutaðar í avtøkuárinum, roknaðar sum søla av partabrøvum. Vinningur ella tap verða í hesum sambandi uppgjørd sum útlutað upphædd við frádrátti fyri útveganarupphædd. Útlutanir í árum frammanundan avtøkuárinum verða roknaðar sum vinningsbýti.

8.2 Vinningur við avhending av lánsbrøvum

Vinningur og tap við innfrían, sølu og aðra avhending av lánsbrøvum verða skattað sum kapitalvinningsinntøka sambært kapitalvinningsskattalógini.

Hjá persónum skal vinningur av lánsbrøvum bert roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni um vinningurin er meira enn 1.000 kr. samanlagt um árið.

Hjá persónligum skattgjaldarum kann tap av lánsbrøvum bert dragast frá í kapitalvinningsinntøkuni, um lánsbrøvini eru skrásett á virðisbrævamarknaði.

Tap av skuldarum og tap av viðurlagsvinnu, umframt valutakursvinningur og valutakurstap, sum hava samband við skattgjaldarans vinnuvirki, verða viðgjørt eftir reglunum í skattalógini.

8.3 Eftirgeving av skuld

Vinningur ella tap í sambandi við eftirgeving av skuld verða roknað við í kapitalvinningsinntøkuna í tann mun, skuldin verður eftirgivin niður um kursvirðið á kravinum fyri kravánaran, tá ið skuldin varð eftirgivin.

Reglan umfatar vinning ella tap í sambandi við eftirgeving, fyrning, samanrenning og fyrilokan av skuld, umframt neyðskuldarsemju og sjálvbodna skuldarsemju.

8.4 Vinningsbýti

Vinningsbýti til persónar og útlendsk feløg skal roknast við í uppgerðina av kapitalvinningi sambært kapitalvinningsskattalógini.

Útlutandi felagið hevur skyldu at afturhalda og avrokna vinningsbýtisskattin til TAKS innan 14 dagar frá tí at avgerðin um útlutan varð tikin.

Feløg og grunnar, sum eru fult skattskyldug í Føroyum, skulu tó ikki gjalda skatt av vinningsbýti, uttan mun til ognarpart í útlutandi felagnum. Í slíkum førum skal útlutandi felagið tí ikki afturhalda og avrokna vinningsbýtisskatt.

Í sambandi við útlutan av vinningsbýti til útlendskar persónar og feløg, skal útlutandi felagið eftirhalda 35% í skatti, tá ið útlutað verður til útlendskar persónar, og 18% í skatti, tá ið útlutað verður til útlendsk feløg. Um viðkomandi persónar og feløg eru umfatað av einum tvískattasáttmála við Føroyar, kunnu tey í ávísum førum søkja um at fáa part ella allan vinningsbýtisskattin afturgoldnan frá TAKS.

8.5 Rentur

Rentuinntøkur hjá persónum skulu roknast við í uppgerðina av kapitalvinningi og skattast við 35%. Renta av eftirlønarskipan skal tó ikki roknast við í uppgerðina av kapitalvinningi.

Tað áliggur peningastovnum og/ella postgiro vegna kontuhavararnar at uppkrevja og avrokna skattin av rentuinntøkum hjá persónum.

Í uppgerðini av kapitalvinningsinntøkuni kunnu likamligir persónar draga frá rentuútreiðslur, sum stava frá lántøku í sambandi við keyp av virðisbrøvum. Hevur persónurin ikki positivan kapitalvinning at mótrokna í, kunnu rentuútreiðslurnar flytast fram til frádrátt í kapitalvinningsinntøku komandi 5 árini.

Persónar hava ikki rætt til frádrátt fyri aðrar rentuútreiðslur. Rentustuðul verður tó latin fyri rentur av sethúsalánum v.m., sí petti 9.1.

Fyri feløg eru allar rentuinntøkur vanlig skattskyldug inntøka, og skulu hesar gevast upp til skattingar á vanligu sjálvuppgávuni. Rentuútreiðslur hjá feløgunum verða frádrignar eftir vanligu reglunum í skattalógini.

8.6 Vinnuligt virksemi

Kapitalvinningsinntøka, íroknað vinningsbýti og rentur, sum er liður í skattgjaldarans vinnuliga virksemi, verður roknað við í uppgerðina av skattskyldugu inntøkuni sambært skattalógini.

9. Stuðul

9.1 Rentustuðul

Rentustuðul verður veittur fyri rentur av:

1. lánum, avtalað áðrenn 18. januar 1991
2. lánum, avtalað 18. januar 1991 ella seinni til
   - keyp ella bygging, umvæling ella umbygging av egnum bústaði
   - keyp ella bygging, umvæling ella umbygging av bústaðareindum í lutaíbúðarfeløgum
   - útbúgving
   - gjaldan av ábyrgd fyri vinnuvirki, sum er avtalað áðrenn 3. desember 1994

Í sambandi við lán til egnan bústað ella bústaðareind í lutaíðbúðarfelag, verður stuðul bert veittur um talan er um veruliga bústaðin hjá viðkomandi persóni. Eigur viðkomandi persónur fleiri bústaðir, verður stuðul bert veittur fyri lán til høvuðsbústaðin.

	2009	2010
Rentustuðul	40%	39%

Í tíðarskeiðinum frá 1. januar 2010 til 1. januar 2014 lækkar rentustuðulin við einum prosenti um árið, soleiðis at frá 1. januar 2014 verður rentustuðulin ásettur til 35%.

Rentustuðulin verður veittur við omanfyristandandi prosentupphædd av samlaðu rentuútreiðslunum hvørt ár.

Fyri lán, avtalað 18. januar 1991 ella seinni, til keyp ella bygging, umvæling ella umbygging av egnum bústaði, verður rentustuðul tó veittur við omanfyristandandi prosentupphædd av í mesta lagi 150.000 kr. um árið.

Rentustuðul verður bert veittur eftir umsókn til persónar undir fullari skattskyldu til Føroyar. Rentustuðulin verður útgoldin gjøgnum peningastovnarnar hvønn mánað.

9.2 Ferðastuðul

Persónur, ið hevur lønarinntøku, herundir fiski- og útróðrarpart, og sum hevur útreiðslur í sambandi við ferðing ímillum bústað og arbeiðsstað í Føroyum, hevur rætt til ferðastuðul, um hann er undir fullari skattskyldu og er búsitandi í Føroyum.

Ferðastuðul verður veittur við niðanfyristandandi upphæddum fyri hvønn dag, um ferðaleiðin aftur og fram millum heim og arbeiðsstað er longri enn 15 km.

Ferðaleið aftur og fram millum bústað og arbeiðsstað	2009	2010
15 til 30 km	5,50 kr.	5,50 kr.
30 til 50 km	13,00 kr.	13,00 kr.
50 til 64 km	19,50 kr.	19,50 kr.
64 til 102 km	25,50 kr.	25,50 kr.
102 til 124 km	30,50 kr.	30,50 kr.
124 til 146 km	35,50 kr.	35,50 kr.
146 til 168 km	40,50 kr.	40,50 kr.
168 til 190 km	45,50 kr.	45,50 kr.
190 til 212 km	50,50 kr.	50,50 kr.
212 km og longri	55,50 kr.	55,50 kr.

Vegastrekkir verða uppgjørd sambært ásetingunum hjá Landsverk.

Fyri ferðing millum heim og arbeiðsstað loftvegis, sjóvegis og gjøgnum undirsjóvartunlar verður stuðul veittur við niðanfyristandandi upphæddum pr. túr fyri tveir túrar dagliga.

Ferðaleið	2009	2010
Loftvegis við tyrlu	16,90 kr.	16,90 kr.
Sjóvegis við suðuroyarleiðini	16,90 kr.	16,90 kr.
Sjóvegis við øðrum ferðaleiðum	8,45 kr.	8,45 kr.
Koyring gjøgnum undirsjóvartunlar	8,45 kr.	8,45 kr.

Ferðastuðulin verður bert latin eftir umsókn. Til umsóknina krevst serligt umsóknarblað, sum kann fáast frá TAKS. Um ein persónur fær endurgjald á annan hátt fyri ferðaútreiðslur, hevur viðkomandi ikki samstundis rætt til omanfyrinevnda stuðul.

Ferðastuðulin verður útgoldin 2 ferðir um árið, seinast í januar og seinast í juli mánað.

9.3 Stuðul til dupult húsarhald

Rætt til stuðul til dupult húsarhald hevur giftur persónur, ið er búsitandi í Føroyum, og sum av arbeiðsávum hevur útreiðslur til dupult húsarhald. Stuðul kann eisini veitast, tá ið arbeitt verður uttanlands.

Stuðulin í sambandi við dupult húsarhald er:

	2009	2010
Fyri leigu av høli, um mánaðin	488 kr.	488 kr.
Fyri útreiðslur til kost fyri hvønn arbeiðsdag	20,50 kr.	20,50 kr.

Minstaupphæddin, ið viðkomandi sjálvur skal bera, er ásett til 850 kr. fyri stuðulsskeiðið. Hetta merkir, at persónar hava rætt til fullan stuðul um teir sjálvir hava útreiðslur upp á í minsta lagi 850 kr. um hálvárið.

Stuðulin verður bert latin eftir umsókn. Til umsóknina krevst serligt umsóknarblað, sum kann fáast frá TAKS. Um ein persónur fær endurgjald á annan hátt fyri útreiðslur í sambandi við dupult húsarhald, hevur viðkomandi ikki samstundis rætt til omanfyrinevnda stuðul.

Stuðulin til dupult húsarhald verður útgoldin 2 ferðir um árið, seinast í januar og seinast í juli mánað.

9.4 Stuðul til uppihaldspening

Rætt til stuðul til uppihaldspening hevur persónur undir fullari skattskyldu í Føroyum, treytað av at persónurin av tí almenna er álagdur at:

- gjalda uppihaldspening til hjúnafelaga, skildan ella sundurlisnan
- gjalda uppihaldspening til børn yngri enn 18 ár, og sum ikki búgva hjá uppihaldsskylduga.

	2009	2010
Av goldna uppihaldspeninginum verður endurgoldið	50%-40%	40%

Galdandi frá 1. juli 2009 er stuðulin til uppihaldspening lækkaður frá 50% til 40%.

Stuðulin verður bert latin eftir umsókn. Til umsóknina krevst serligt umsóknarblað, sum kann fáast frá Almannastovuni. Um ein persónur fær ella hevur fingið endurgjald á annan hátt fyri útreiðslur til uppihaldspening, hevur viðkomandi ikki samstundis rætt til omanfyrinevnda stuðul.

Stuðulin til uppihaldspening verður útgoldin 2 ferðir um árið, seinast í juni og seinast í desember mánað.

9.5 Stuðul til bygging og umvæling av egnum bústaði

Persónur, sum byggir ella umvælir egnan bústað, hevur rætt til stuðul fyri meirvirðisgjald av arbeiðsløn í hesum sambandi. Lutaíbúðarfeløg, sum byggja ella umvæla egnar lutaíbúðir, hava somuleiðis rætt til stuðul fyri meirvirðisgjald av arbeiðsløn.

Stuðul verður veittur fyri meirvirðisgjald av arbeiðsløn við niðanfyristandandi upphæddum fyri hvørt matr.nr. ella fyri hvønn lut í lutaíbúðarfelag.

Tíðarskeið	Hægsta stuðulsupphædd
Fram til 1. juli 2010	150.000 kr.
Frá 1. juli 2010	100.000 kr.
Frá 1. juli 2011	50.000 kr.
Frá 1. januar 2012	0 kr.

Fram til 1. januar 2012 verður eftirverandi stuðulskvota til ein og hvørja tíð ásett til tað lægra virðið av:

1. Hægstu stuðulsupphædd í tíðarskeiðinum
2. 150.000 kr. minus brúkta kvotu

Um lønarparturin er størri enn tilfarsparturin, verður stuðul veittur við í mesta lagi helvtini av meirvirðisgjaldinum av arbeiðsløn og tilfari til samans.

Stuðulin verður bert latin eftir umsókn. Til umsóknina krevst serligt umsóknarblað, sum kann fáast frá TAKS. Saman við umsóknini skal viðleggjast avrit av fakturum og kvittanum.

10. Sosial gjøld

10.1 Arbeiðsloysistrygging (ALS)

Gjøld til ALS	2009	2010
Løntakarar av A-inntøku	1,00%	1,00%
Arbeiðsgevarar av A-inntøku	1,00%	1,00%
Sjálvstøðugt vinnurekandi av inntøku sambært skattaroknskapi	1,00%	1,00%
Løntakarar við útlendskari inntøku (árligt gjald)	3.000 kr.	3.000 kr.

Allir persónar frá 16 til 67 ár, sum hava A-inntøku, og sum eru undir fullari skattskyldu til Føroyar, skulu gjalda til ALS. Persónar, sum móttaka hægstu fyritíðarpensjón, kunnu tó eftir umsókn verða frítiknir frá gjaldsskyldu til ALS. Somuleiðis kunnu persónar, sum hava tíðaravmarkað uppihalds- og arbeiðsloyvi, eisini verða frítiknir frá gjaldsskyldu til ALS fyri upp til eitt ár í senn.

ALS-galdið verður roknað av øllum A-inntøkum tó ikki av fólka- og fyritíðarpensjónum. Somuleiðis skal heldur ikki gjaldast ALS-gjald av tænastumannapensjónum og skattskyldugum almannaveitingum. Hjá persónum kann ALS gjaldið í mesta lagi vera 6.500 kr. um árið.

Arbeiðsgevarar skulu gjalda til ALS av øllum útgoldnum A-inntøkum, tó ikki av A-inntøkum til útlendingar undir FAS-skipanini ella FAS-líknandi skipan, sum gevur rætt til afturbering av skatti til reiðaran. Tá ið A-inntøka verður útgoldin, skal arbeiðsgevarin avrokna sín part av gjaldinum til ALS.

Tey, sum hava inntøku sum sjálvstøðugt vinnurekandi, ella hava inntøku frá útlendskum arbeiðsgevara, kunnu sjálvboðin tekna arbeiðsloysistrygging fyri hesar inntøkur.

Persónar undir avmarkaðari skattskyldu skulu ikki gjalda til ALS.

Løntakarar kunnu ikki frádraga gjaldið til ALS, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp. Sjálvstøðugt vinnurekandi kunnu heldur ikki frádraga sjálvbodna ALS gjaldið í skattskyldugu inntøkuni.

Arbeiðsgevarar kunnu frádraga ALS gjøld í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni.

10.2 Barsilsskipanin

Gjøld til barsilsgrunnin	2009	2010
Løntakarar, av A-inntøku	0,62%	0,62%
Arbeiðsgevarar, av A-inntøku	0,62%	0,62%
Sjálvstøðugt vinnurekandi (árligt gjald)	500 kr.	500 kr.
Løntakarar við útlendskari inntøku (árligt gjald)	500 kr.	500 kr.

Allir persónar frá 16 til 67 ár, sum hava A-inntøku, og sum eru undir fullari skattskyldu til Føroyar, skulu gjalda til barsilsskipanina. Persónar, sum móttaka hægstu fyritíðarpensjón, kunnu tó eftir umsókn verða frítiknir frá gjaldsskyldu til barsilsgrunnin. Somuleiðis kunnu persónar, sum ikki hava fastan bústað í Føroyum, eisini verða frítiknir frá gjaldskyldu til barsilsgrunnin.

Gjaldið til barsilsgrunnin verður roknað av øllum A-inntøkum, tó ikki av fólka- og fyritíðarpensjónum. Somuleiðis skal heldur ikki gjaldast til barsilsgrunnin av tænastumannapensjónum og skattskyldugum almannaveitingum.

Allir arbeiðsgevarar skulu gjalda til barsilsskipanina av útgoldnum A-inntøkum, tó ikki av A-inntøkum til útlendingar undir FAS-skipanini ella av A-inntøkum til útlendingar við skipum ið verða javnmett við FAS-skip. Tá ið A-inntøka verður útgoldin, skal arbeiðsgevarin avrokna sín part av gjaldinum til Barsilsgrunnin.

Persónar, sum hava inntøku sum sjálvstøðugt vinnurekandi og persónar, sum hava útlendska lønarinntøku, kunnu somuleiðis tekna sjálvbodna trygging.

Persónar undir avmarkaðari skattskyldu skulu ikki gjalda til barsilsskipanina.

Løntakarar kunnu ikki draga gjaldið til barsilsskipanina frá, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp. Sjálvstøðugt vinnurekandi kunnu heldur ikki frádraga sjálvbodna gjaldið til barsilsskipanina í skattskyldugu inntøkuni.

Arbeiðsgevarar kunnu frádraga gjøld til barsilsskipanina í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni.

10.3 Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur

Gjøld til arbeiðsmarknaðargrunnin	2009	2010
Løntakarar, av skattskyldugu inntøkuni	1,75%	1,75%
Arbeiðsgevarar, av goldnum A-lønum	1,75%	1,75%
Sjálvstøðugt vinnurekandi av skattskyldugu inntøkuni	1,75%	1,75%

Allir persónar, sum eru undir skattskyldu til Føroyar, skulu gjalda til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Tó skulu persónar, sum eru avmarkað skattskyldugir til Føroyar, ikki rinda til grunnin av løn, sum er vunnin við skipum undir FAS-skipanini ella við skipum, ið verða javnmett við FAS-skip. Avgjaldið verður rindað av skattskyldugu inntøkuni og goldið saman við fyribilsskattinum.

Allir arbeiðsgevarar, sum útgjalda A-inntøku, skulu rinda avgjald til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin av útgoldnari A-inntøku, tó ikki av A-inntøku til útlendingar undir FAS-skipanini ella av A-inntøku til útlendingar við skipum sum verða javnmett við FAS skip. Tá ið A-inntøka verður rindað, skal arbeiðsgevarin avrokna sín part av gjaldinum til TAKS.

Persónar, sum eru 67 ár og eldri, rinda einki í grunnin. Arbeiðsgevarar, sum eru 67 ár ella eldri, og hava fólk í vinnu, rinda tó til grunnin. Persónar, ið fylla 64 ár 1. juli 2009 ella seinni, sum ikki áður hava havt fastan bústað í Føroyum, og sum við tilflyting fáa fastan bústað í Føroyum, rinda einki í grunnin.

Løntakarar og sjálvstøðugt vinnurekandi kunnu ikki draga gjaldið til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin frá, tá ið skattskylduga inntøkan verður gjørd upp.

Arbeiðsgevarar kunnu frádraga gjøld til arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin í uppgerðini av skattskyldugu inntøkuni.

10.4 Heilsutrygd

Persónar, ið eru búsitandi í Føroyum, og sum eru 18 ár ella eldri, rinda frá 1. januar 2010 eitt mánaðarligt gjald upp á 245 kr. til Heilsutrygd. Sum búsitandi í Føroyum verður roknaður persónur, sum er skrásettur hjá Landsfólkayvirlitinum sum búgvandi í Føroyum.

TAKS krevur gjaldið inn fyri Heilsutrygd. Um gjaldið ikki verður goldið innan ásettu freist verður rentutilskriving framd við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað. Persónar, búsitandi á stovni og sum harvið fáa niðursetta almannapensjón, gjalda ikki til Heilsutrygd.

11. Meirvirðisgjald

11.1 Skrásetingarskyldan

Tann, sum rekur vinnuligt virksemi við sølu av mvg-skyldugum vørum og tænastum, hevur skyldu at lata virki sítt mvg-skráseta hjá TAKS, um árliga sølan er 30.000 kr. ella meiri.

Skrásetingarskyldan er eisini galdandi fyri útlendsk virki, sum í styttri ella longri tíðarskeið reka vinnuligt virksemi í Føroyum við sølu av avgjaldsskyldugum vørum.

Hjá útlendskum virkjum, sum selja avgjaldsskyldugar tænastur í Føroyum, er skrásetingarskyldan sum meginregla tengd at, um keyparin av tænastuni er skrásetingarskyldugur ella ikki.

Avgjaldsskyldan er galdandi fyri allar nýggjar og brúktar vørur. Avgjaldsskyldan er harumframt galdandi fyri allar tænastur burtursæð frá teimum, sum beinleiðis eru undantiknar í lógini um meirvirðisgjald.

Meirvirðisgjaldsskráseting skal vera framd í seinasta lagi 8 dagar, áðrenn avgjaldsskylduga virksemið byrjar.

Meirvirðisgjaldssatsurin er 25%.

11.2 Undantøk frá avgjaldsskylduni

Søla av tænastum innan ávís øki er undantikin avgjaldsskylduni. Hesar tænastur fevna millum annað um viðgerð á heilsuøkinum, almanna umsorgan á barna- og eldraøkinum, undirvísing í skúla v.m., mentanarligt virksemi, ítrótt og ítróttartiltøk, fólkaflutning, postflutning, útleigu, uppsiting og umsiting av fastari ogn, tryggingarvirksemi, banka-, sparikassa-, postgiro- og fíggjarvirksemi og ferðamannastovuvirksemi.

Virki, sum bert selja slíkar tænastur, kunnu ikki verða meirvirðisgjaldsskrásett og fáa sostatt ikki endurgoldið meirvirðisgjald av rakstrarkostnaði ella íløgum.

Í meirvirðisgjaldslógini er harumframt ásett, at meirvirðisgjald ikki skal leggjast á, tá ið ávísar vørur og tænastur verða seldar. Nøkur av hesum undantøkum eru galdandi fyri vørur og tænastur, sum verða seldar til útlond, meðan onnur av undantøkunum eru galdandi fyri sølu av ávísum vørum og tænastum í Føroyum. Í slíkum førum er talan um meirvirðisgjaldsskrásett virki, sum hava rætt til at fáa endurgoldið meirvirðisgjald av rakstrarkostnaði og íløgum.

11.3 Útleiga av fastari ogn

Útleiga av fastari ogn er undantikin avgjaldsskyldu. Hetta merkir samstundis eisini, at útleigarin ikki kann fáa frádrátt fyri mvg í sambandi við íløgur og rakstrarkostnað.

Virki, sum útleiga fasta ogn, kunnu tó sjálvboðin lata seg skráseta, um útleigað verður til persón ella felag, sum nýtir ognina til avgjaldsskyldugt virksemi. Sjálvbodna skrásetingin kann ikki fevna um útleigu til bústaðarendamál. Sjálvbodna skrásetingin kann heldur ikki fevna um áður gjørdar leigusáttmálar uttan so, at leigarin játtar hesum.

Virki, sum sjálvboðin eru vorðin meirvirðisgjaldsskrásett, skulu krevja upp sølu-mvg og hava frádráttarrætt fyri keyps-mvg á sama hátt sum aðrar skrásettar fyritøkur.

Sjálvboðin skráseting fyri útleigu av fastari ogn kann í fyrsta lagi verða søgd upp 2 ár aftaná skrásetingina.

11.4 Ongin frádráttur fyri meirvirðisgjald av ávísum kostnaði

Meirvirðisgjaldsskrásett virki kunnu ikki draga frá meirvirðisgjald, sum viðvíkur:

- gávum
- mati til starvsfólk og handhavarar
- naturaliasamsýningum til starvsfólk
- útvegan og rakstri av íbúð fyri starvsfólk og handhavarar
- útvegan og rakstri av vøggustovu, barnagarði, frítíðarheimi, summarhúsi o.t. fyri starvsfólk.

11.5 Meirvirðisgjald í sambandi við keyp/sølu og rakstur av bilum

	Útveganarupphædd	Rakstrarkostnaður
Persón- og vøruvognar undir 3.500 kg. Nýttir til bæði vinnulig og privat endamál	Meirvirðisgjald verður ikki endurrindað	Meirvirðisgjald verður endurrindað í síni heild
Persón- og vøruvognar undir 3.500 kg. Nýttir vinnuliga burturav	Meirvirðisgjald verður endurrindað í síni heild	Meirvirðisgjald verður endurrindað í síni heild
Lastvognar yvir 3.500 kg. Nýttir til bæði vinnulig og privat endamál	Parturin av meirvirðisgjaldinum, sum viðvíkur vinnuligu nýtsluni, verður endurrindaður	Meirvirðisgjald verður endurrindað í síni heild

Tá meirvirðisgjaldsskrásett virki selur bil, skal meirvirðisgjald leggjast á søluupphæddina. Tó skal meirvirðisgjald ikki

áleggjast í sambandi við sølu av bili, tá ið virkið ikki hevði rætt til frádrátt fyri meirvirðisgjald av keypskostnaðinum. Hetta merkir, at meirvirðisgjald ikki skal leggjast á søluupphæddir, tá ið bilar undir 3.500 kg. verða seldir, sum heilt ella partvíst hava verið nýttir privat.

11.6 Meivirðisgjald av tapi upp á skuldarar

Tá ið eitt tap upp á ein skuldara er staðfest, er møguligt at fáa endurrindað sølu-mvg av staðfesta tapinum.

Eitt tap verður mett sum endaliga staðfest, tá ið:

- trota- ella deyðsbúgv (skuldnoktanarbúgv) er endaliga uppgjørt
- eitt tilgóðahavandi er lækkað í sambandi við eina neyðskuldarsemju
- eitt tilgóðahavandi er lækkað í sambandi við sjálvbodna skuldarsemju, har endamálið hjá ognaranum við semjuni er at fáa mest møguligan fulnað
- úrslitaleys fútarættargerð fyriliggur, ella tá ið annar ognari hevur framt úrslitaleysa fútarættargerð innan fyri teir seinastu seks mánaðirnar
- fastognin hjá einum persónliga riknum virki er seld á tvingsilssølu, uttan at hetta hevur givið ognaranum fulnað fyri sínum kravi
- tað í aðramátar verður mett, at nóg nógv er gjørt til tess at krevja tilgóðahavandi inn.

11.7 Lønarhæddaravgjald

	2009	2010
Læknu- tannlækna- og annað dentalvirksemi, kiropraktik, fysioterapi og onnur verulig heilsurøkt	2,5%	2,5%
Tryggingarvirksemi	5,0%	10,0%
Banka-, sparikassa- og fíggjarvirksemi og serligar elektroniskar tænastur, ið eru neyðugar fyri hetta virksemið	5,0%	10,0%

Avgjaldsskyldan fevnir ikki um Vinnuframagrunnin, Færøernes Realkreditinstitut, Húsalánsgrunnin, Búnaðargrunnin, Fíggjargrunnin frá 1992 og Framtaksgrunnin.

Fyri tey virki, sum gjalda 2,5% í lønarhæddaravgjaldi, er avgjaldsgrundarlagið útgoldin A-lønarupphædd hjá virkinum umframt avlop ella undirskot av sjálvstøðugum vinnuvirksemi.

Fyri tey, sum gjalda 5% ella 10% í lønarhæddaravgjaldi, er avgjaldsgrundarlagið útgoldin A-løn.

Sum nevnt frammanfyri, eru vegleiðingarnar stuttorðaðar og fevna bert um ein part av galdandi skattareglum. Hetta merkir, at tygum helst fáa brúk fyri fleiri upplýsingum.

Tygum eru vælkomin at ringja á tlf. 34 34 34, at senda telefaks á 34 34 35 ella at senda teldupost til spekt@spekt.fo. Eisini ber til at ringja beinleiðis til okkara grannskoðarar á niðanfyristandandi tlf. nr.

Statsaut. revisorar:

Mirjam Haraldsen
tlf. 23 34 70

Finnbjørn Zachariasen
tlf. 23 34 75

Jóhannes Færø
tlf. 23 34 85

Grannskoðarar:

Annika Jacobsen
tlf. 23 34 67

Annfinn Simonsen
tlf. 23 34 74

Bjarne Rasmussen
tlf. 23 34 76

Helena Andreasen
tlf. 23 34 73

Hanna Wang
tlf. 23 34 72

Hjalti Hvítklett
tlf. 23 34 82

Hjalmar Klein Olsen
tlf. 23 34 68

Eyðfinn Olsen
tlf. 23 34 98

Jákup Jacobsen
tlf. 23 34 63

Rúna Mikkelsen
tlf. 23 34 61

Joan Andreasen
tlf. 23 34 65

Rúni Dragaberg
tlf. 23 34 89

Símun Thomsen
tlf. 23 34 87

Rúni Kruse
tlf. 23 34 80

Skrivstova

Staravegur 17
tlf. 34 34 34
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

JANUAR		FEBRUAR		MARS		APRÍL		MAI		JÚNÍ	
F 1	Nýggjársdagur	M 1		M 1		H 1	Skírhósdagur	L 1		T 1	
L 2		T 2		T 2		F 2	Langi fríggjadagur	S 2		M 2	
S 3		M 3		M 3		L 3		M 3	Sjálvuppgávu vimmuleiki	H 3	
M 4		H 4		H 4		S 4	Páskadagur	T 4		F 4	
T 5		F 5		F 5		M 5	2. páskadagur	M 5		L 5	
M 6		L 6		L 6		T 6		H 6		S 6	
H 7		S 7		S 7		M 7		F 7		M 7	
F 8		M 8		M 8		H 8		L 8		T 8	
L 9		T 9		T 9		F 9		S 9		M 9	
S 10		M 10	MVG/ Lanarheddarovgává	M 10		L 10		M 10	MVG/ Lanarheddarovgává	H 10	
M 11		H 11		H 11		S 11		T 11		F 11	
T 12		F 12		F 12		M 12		M 12		L 12	
M 13		L 13		L 13		T 13		H 13	Kristi himmalferðardagur	S 13	
H 14		S 14		S 14		M 14		F 14		M 14	
F 15		M 15		M 15	Sjálvuppgávu + Kap. vinn. sjálvuppgávu, personar	H 15		L 15		T 15	
L 16		T 16		T 16		F 16		S 16		M 16	
S 17		M 17		M 17		L 17		M 17		H 17	
M 18		H 18		H 18		S 18		T 18		F 18	
T 19		F 19		F 19		M 19		M 19		L 19	
M 20	B-skattur	L 20		L 20		T 20	B-skattur	H 20	B-skattur	S 20	
H 21		S 21		S 21		M 21		F 21		M 21	B-skattur Longsti dagur
F 22		M 22	B-skattur	M 22	B-skattur	H 22		L 22		T 22	
L 23		T 23		T 23		F 23		S 23	Hvítusunnudagur	M 23	
S 24		M 24		M 24		L 24		M 24	2. hvítusunnudagur	H 24	Jónsøka
M 25		H 25		H 25		S 25	Flaggdagur	T 25		F 25	
T 26		F 26		F 26		M 26		M 26		L 26	
M 27		L 27		L 27		T 27		H 27		S 27	
H 28		S 28		S 28	Pálmasunnudagur / Summartíð byrjar	M 28		F 28		M 28	
F 29				M 29		H 29		L 29		T 29	
L 30				T 30		F 30	Dýri lúðadagur	S 30		M 30	
S 31	Fastrunarkortur			M 31				M 31			
20 arbeiðsdagar / 5 leygardagar		20 arbeiðsdagar / 4 leygardagar		23 arbeiðsdagar / 4 leygardagar		18 arbeiðsdagar / 4 leygardagar		19 arbeiðsdagar / 5 leygardagar		22 arbeiðsdagar / 4 leygardagar	

JULI		AUGUST		SEPTEMBER		OKTOBER		NOVEMBER		DESEMBER	
H 1	Sjálvuppgáva + Kap. vinn. sjálvuppg., P/F & Sp/f.	**S 1**		M 1		F 1		M 1	Minningardagur teirra sjálátnu	M 1	
F 2		M 2		H 2		**L 2**		T 2		H 2	
L 3		T 3		F 3		**S 3**		M 3		F 3	
S 4		M 4		**L 4**		M 4		H 4		**L 4**	
M 5		H 5		**S 5**		T 5		F 5		**S 5**	
T 6		F 6		M 6		M 6		**L 6**		M 6	
M 7		**L 7**		T 7		H 7		**S 7**		T 7	
H 8		**S 8**		M 8		F 8		M 8		M 8	
F 9		M 9		H 9		**L 9**		T 9		H 9	
L 10		T 10	MVG/ Lanarhæddaravgjald	F 10		**S 10**		M 10	MVG/ Lanarhæddaravgjald	F 10	
S 11		M 11		**L 11**		M 11		**H 11**		**L 11**	
M 12		H 12		**S 12**		T 12		F 12		**S 12**	
T 13		F 13		M 13		M 13		**L 13**		M 13	
M 14		**L 14**		T 14		H 14		**S 14**		T 14	
H 15		**S 15**		M 15		F 15		M 15		M 15	
F 16		M 16		H 16		**L 16**		T 16		H 16	
L 17		T 17		F 17		**S 17**		M 17		F 17	
S 18		M 18		**L 18**		M 18		H 18		**L 18**	
M 19		H 19		**S 19**		T 19		F 19		**S 19**	
T 20	B-skattur	F 20	B-skattur	M 20	B-skattur	M 20	B-skattur / Partafelagsskattur	**L 20**		M 20	
M 21		**L 21**		T 21		H 21		**S 21**		T 21	B-skattur / Partafelagsskattur
H 22		**S 22**		M 22		F 22		M 22	B-skattur / Partafelagsskattur	M 22	Stytsti dagur
F 23		M 23		H 23		**L 23**		T 23		H 23	
L 24		T 24		F 24		**S 24**		M 24		F 24	Tollaksmessa
S 25		M 25		**L 25**		M 25		H 25		**L 25**	Jólaaftan
M 26		H 26		**S 26**		T 26		F 26		**S 26**	Jóladagur
T 27		F 27		M 27		M 27		**L 27**		M 27	2. Jóladagur
M 28	Ólavsøka	**L 28**		T 28		H 28		**S 28**		T 28	
H 29		**S 29**		M 29		F 29		M 29		M 29	
F 30		M 30		H 30		**L 30**		T 30		H 30	
L 31		T 31				**S 31**	Summartíð endar			F 31	Nýggársaftan
20 arbeiðsdagar / 5 leygardagar		22 arbeiðsdagar / 4 leygardagar		22 arbeiðsdagar / 4 leygardagar		21 arbeiðsdagar / 5 leygardagar		22 arbeiðsdagar / 4 leygardagar		23 arbeiðsdagar / 4 leygardagar	

SPEKT | løggildir grannskoðarar